Jørgen Niclasen
vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(§ 154 b frádráttur)

§ 1

Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, løgtingslóg nr. 39 frá 16. mai 2024, løgtingslóg nr. 145 frá 20. desember 2024 og løgtingslóg nr. 75 frá 30. apríl 2025 verður aftan á § 154 a sett:

"**§ 154 b.** Tá tvískatting verður avtikin, verður avgjald, sum goldið til eitt annað land enn Føroyar og sum fevnt av norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd, talt við sum ein skattur, goldin í Norðurlondum."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2025.

Almennar viðmerkingar

Við løgtingsmáli nr. 37/2023 varð ásetingin í § 154 b í skattalógini strikað og uttanlandsfrádrátturin eftir § 33, nr. 13 minkaður munandi yvir nøkur ár. Síðan tá hevur landsstýrið, uttan um Løgtingið, men bert við kunngerð, broytt linkingarhátt fyri lønarinntøkur hjá skattaborgarum, sum arbeiða í øðrum Norðurlondum enn Danmark og Grønlandi.

Hetta merkir, at inngjald til norska Folketrygden (NAV) ikki longur verður roknað sum ein skattur. Henda skipan kom annars upprunaliga í skattalógina í 2012 og varð tá einmælt samtykt av øllum flokkum í Løgtinginum.

Í viðmerkingum til lógaruppskotið frá landsstýrinum tá (lm. 34/2012), stóð millum annað:

"*Í dupultskattahøpi verður Folketrygden ikki roknað sum skattur, men eftir vanligum búskaparligum definitiónum er eingin ivi um, at Folketrygden er ein skattur, og gjaldið til Folketrygden merkist tí í veruleikanum sum ein dupultskatting.*".

Nógvir føroyingar, sum arbeiða uttanlands, eru noyddir at rinda til Folketrygden. Inngjaldið er 8,2% av lønini. Hendan trygging dekkar eina rød av umstøðum, men stórur partur er eftirløn. Felags fyri øll útgjøld, eisini eftirløn, er galdandi, at tey eru skattskyldig við útgjald.

At § 154 b frádrátturin bleiv strikaður stutt fyri jól 2023 merkir, at talan verður um dupultskatting, t.e. skatting bæði við inngjald og útgjald.

Nógv orrusta var, tá vit í Føroyum fóru frá at eftirskatta eftirlønir til at forskatta tær. Við núverandi skipan er talan um bæði forskatting og eftirskatting av eftirlønum hjá ávísum útisiglarum. Tað kann ikki vera rímiligt.

Fyri at sleppa undan dupultskatting verður hetta lógaruppskotið lagt fram.

Uppskotið er saman við øðrum uppskoti um avtøku av stigvísu minkingini av uttanlandsfrádráttinum, ið verður lagt fram samstundis sum hetta málið, við til at steðga og hjá øðrum minka um methøgu skattahækkingina.

Fíggjarligar avleiðingar

Skattaálopið í 2023 á útisiglarar í Norra og fólk, sum arbeiða í Norra, skuldi sambært landsstýrinum geva landkassanum hægri inntøkur. Undir allari viðgerðini varð víst á, at hetta neyvan fór at halda, tí slík høg skattahækking fór at tvinga mong at flyta arbeiði t.d. til aðra skattafría skipan sum DIS ella at fáa tey at flyta land.

Longu nú sæst sjón fyri søgn í uppgerð frá TAKS um skattskyldigar inntøkur. Áðrenn 2024 byrjar, hava 70 persónar valt at flyta arbeiði ella flyta land t.v.s. hava onga slíka inntøku. Men helst eru væl fleiri fluttir í árinum, tí skattskyldiga inntøkan frá hesum bólkinum er minkað 65 mió. kr. í 2024. Skattamissurin av hesum inntøkum er sannlíkt hægri enn inntøkuvøksturin, sum landsstýrið væntaði av skattahækkingini.

Hendan flyting av fólki fer at halda fram, um broyting ikki kemur í. Tí eru hesi uppskot við til at steðga inntøkumissinum hjá landinum. Tó tekur tað helst tíð at fáa hesi fólk aftur á skattskyldiga inntøku í Føroyum. Tað merkir, at uppskotini sum frá líður fara at tryggja hægri inntøkur, men fara at byrja við at merkja minni inntøkur. Vónleyst er at meta um

stutttíðarvirknað, men sum frá líður eru uppskotini við til at tryggja landskassa og landi okkara størri inntøkur.

Tað er ivasamt, um uppskotið hevur nakrar umsitingarligar avleiðingar av týdningi.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
§ 154 b verður við virknaði frá 1. januar 2025 sett inn aftur í lógina í sama líki sum fram til, at hon varð strikað 1. januar 2024.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 4. november 2025

Jørgen Niclasen